## Jóhan abbi 85 ár



Í dag verður abbi mín, pápi pápa mín, Jóhan Syderbø áttatifimm. Abbi mín var føddur í Kunoy tann 14. mars 1915, sum næstyngstur av sjey systkjum. Longu sum 14 ára gamal fór abbi fyrsta túrin til skips, mær er sagt at tað var við sluppini Reginu, ið var deyðsiglari. Tað mesta av lívinum hevur abbi soleiðis starvast á sjónum, seinast umborð á Smyrli, áðrenn hann fyrst í áttatiárunum legðist upp á land.

Í bókini »Hendingar á leiðini« sigur Bjarni Niclasen so livandi frá minniliga túrinum við Mjóvanes til Ameriku í 1941, hendan túrin var Jóhan abbi eisini við. Spennandi er at lesa um upplivingar teirra umborð, og har mitt í einari tropiskari melduródn stendur Jóhan Syderbø har frammi og heldur kósina, »ein djarvur og klófastur maður« sigur Bjarni um hann.

Eg kenni abba mín sum ein mann við ljósum sinni og einum mildum eygnabrái, altíð skjótur at finna tað stuttliga í tilveruni, og at siga frá einum skálkabrosi og einum »glimti« í eyganum.

Ein følir seg altíð væl at støkka inn á gólvið hjá ommu og abba á Stongunum, har man verður móttikin við opnum ørmum tá ið man kemur, og signaður á heimferðini. Eg minnist serliga tá vit vóru smá, at vit kundu vera vís í at omma og abbi stóðu og veittraðu í vindeyganum, heilt til vit vóru farin um horni niðri hjá Fjallheim.

Abbabørnini, ið nú eru 25 í tali, hava altíð átt eitt stórt pláss í hjartanum hjá teimum báðum, hetta kemur ikki einans til sjóndar tá ið ein er og vitjar har norðuri, men vit kunnu altíð vera vís í at telefonin ringir um høgtíðirnar ella tá ið føðingardagur er.

Sum vera man, verður ein ofta spurdur hvørjum fólki ein er av, og er tað tá eldri fólk eg tosi við, fari eg ofta beinleiðis tvey ættarlið aftur »Abbadóttir gamla Syderbø á Smyrli« letur tað so í mongum »so ert túú av góðum fólki«, tá er ikki sørt at ein gerst eitt sindur errin. Best minnast tey hann fyri tað góða lagið, og hansara fryntligu framferð, »tað hoyrdist tá ið Syderbø var umborð«.

Eg eigi tí einans gott at bera abba mínum á Stongunum, og eg vil við hesum fáu orðum takka honum og ommu fyri alt tað góða tey hava verið ein ímynd av í uppvøkstri mínum, og framvegis eru.

Við føðingardagskvøðum.

**Marjun**

# Johan Syderbø 85

"Maðurin við russarahúgvuni hevur pakkan".

Soleiðis varð mangan sagt í telefonini, tá klaksvíkingar sendu pakka til Havnar við Pride, ella tá suðringar sendu okkurt norður um fjørð við Smyrli.

Í dag fyllir tann lættsinti og fryntligi maðurin við russarahúgvuni og tí sermerkta lítla yvirskegginum 85 ár.

Johan Syderbø er kunoyingur, men síðan seinnapartin av fýratiárunum hevur hann búð á Skáltavegnum í Klaksvík, har hann setti búgv saman við familjuni.

Syderbø hevur havt sítt lívsstarv á sjónum. Longu á barnaárum dróg tað gátufulla havið. Hann plagar at greiða frá hvussu hugtikin hann var tá sluppirnar komu til Kunoyar eftir monnum haðani. Mangan fylgdi hann teimum eftir bakkanum so langt sum til bar, og stóð so og eygleiddi tær til tær hvurvu úr eygsjón.



Fyrstu ferð Syderbø var til skips var við deyðsiglara. Hann var 14 ára gamal tá hann fór við Reginu hjá Napoleon Nolsøe í Vági.

Tíðin, sum nokk fyllir serliga nógv í arbeiðslívinum hjá Syderbø, eru teir 15 mánaðirnir hann var við Mjóvanesi í Amerika undir krígnum, og so árini hann var á lagrinum hjá Kjølbro og samstundis sigldi við Pride.

Tað var ikki lítið vágið at fara úr Føroyum til Amerika mitt undir krígnum. Mjóvanes varð tikin til at flyta føroyskar vørur til New York.

Teir vóru tveir kunoyingar, ið fóru við. Johan Syderbø og Bjarni Niclasen, sum hevur greitt frá ferðini í bókini "Hendingar á leiðini".

Syderbø hevur mangan greitt frá, at teir báðir gingu hús úr húsi í heimbygdini og søgdu farvæl. Tað var týðiligt, at eingin væntaði at síggja teir aftur.

Og tað vóru heldur ikki troystarrík orð teir fingu frá reiðaranum, Andriasi í Túni á Toftum. "Eg ynski tykkum góðan túr, men eg vænti ongantíð at síggja tykkum aftur. Skip fái eg tó altíð aftur". Sum støðan var tá, hevur hetta uttan iva verið ein realistiskur reiðari, tí teir skuldu veruliga sigla vandasjógv. Fá skip vóru sloppin um havið júst ta tíðina uttan at vera álopin av fíggindum.

Teir løgdu út av Havnini 17. apríl 1941. Ferðin yvir gekk væl. Tá teir høvdu ligið eina tíð í New York, vórðu teir sendir at sigla við farmi har yviri - fyrst millum Vestindisku oyggjarnar og Kanada og seinni millum býir í USA og serliga Kanada. Onkrar túrar vóru teir við salti, men mest sigldu teir við koli.

Umstøðurnar frá hávetri og til hásummar vóru ógvuliga ekstremar - frá minus 30 til 40 stig upp í pluss 40 stig - og so í hægstu krígstíð.

Nakrar ferðir vóru teir illa staddir. Onkuntíð eltir av kavbáti, uttan at skot varð latið av. Onkuntíð í nógvum ísi og einaferð í einari tropiskari melduródn. Ta ferðina brotnaði ein 9.000 tons stórur svenskur dampari, sum var staddur tætt við teir, tvørturav so at bara afturskipið fleyt og fleiri mans lótu lív.

Har yviri sigldu teir undir føroyskum flaggi, sum júst var góðkent á heimshøvunum. Hetta voldi teimum ofta trupulleikar, men hevur helst eisini bjargað teimum, t.d. tá kavbátar onkuntíð komu fram á teir og sigldu leingi við síðuna av teimum, uttan at lata skot av, samstundis sum teir vistu at nógv onnur skip tætt við vórðu søkt.

Bjarni Niclasen skrivar, at tá teir vóru komnir aftur á Havnina 15 mánaðir seinni, hevði hetta verið ein hugnalig ferð, hóast hon stundum hevði verið torfør og sera trupul.

Heima høvdu tey frætt lítið ella einki frá teimum og fólk væntaðu ikki at teir komu aftur. Men Lena, sum var trúlovað við Johan Syderbø, segði alla tíðina, at teir komu aftur, tí hon hevði droymt at Johan kom niðan í Kloyv - tað er omanfyri lendingina í Kunoy.

Heim aftur komin, tók Johan seturskiparaprógv í Havn og fór síðan burtur aftur. M.a. sigldi hann í trý ár sum bestimaður við Liljuni.

Í nógv ár var Syderbø álitismaður á Lagrinum hjá Kjølbro á Stongunum. Tey eldru børnini minnast, at pápin hevði næstan ongantíð heilt frí hesi árini. Tað var altíð okkurt sum skuldi fáast frá hondini.

Hvønn týsdag var hann við Pride til bygdirnar í Norðureysturoy, sum ikki høvdu fingið veg. Manningin fekk tætt tilknýti til nógv fólk í hesum bygdum. Syderbø er enn tá gubbi okkurt barnið har norðuri.

Mitt í 1960-unum fór Syderbø at sigla við postbátinum til útoyggjarnar. At hetta var vandamikið, fingu teir sjón fyri søgn. 19. januar 1970 hendi vanlukkan tá teir vóru í Fugloy. Johan var sjálvur annar í lítlabáti tá hann úti fyri Kirkju holvdist. Hin maðurin, Sámal Johannesen, kom ikki aftur í aftur. Johan lá drúgva tíð á Kirkju, áðrenn hann kom fyri seg aftur.

Aftaná hesa hending fór Syderbø umborð aftur á Pride, sum hann hevði stóran tokka til. Pride verður nokk altíð hansara flaggskip, hóast tað um dagarnar fréttist, at Pride er lagdur.

Tá Smyril í 1975 kom til landið, fór hann umborð har og har sigldi hann, til hann fór frá fyri aldur, 67 ára gamal.

Tað vóru mong sum saknaðu Syderbø tá hann ikki longur var umborð á Strandferðsluni. Við sínum lætta sinni kláraði hann oftast at fáa okkurt skemtiligt burtur úr vanligum gerandistosi.

Hóast hann gavst at sigla, gavst hann ikki at standa á skipsdekki, tí í fleiri ár aftaná helt hann náttarvakt umborð á fiskiskipum hjá Kjølbro, meðan tey lógu við bryggju.

Hóast lættsintur, hevur Syderbø ofta verið noyddur at taka tung tøk, tí húsið í Innarstovu hevur mangan verið rakt av sorg og vanlukkum. Flestu menninir í húsinum eru farnir í góðum árum av vanlukku. Tann seinasti var systirsonurin Berint, ið doyði av vanlukku á fjalli næstseinasta summar, 59 ára gamal. Hetta tók hart uppá Syderbø. Berint var uppkallaður eftir beiggja Johan, ið datt oman og doyði 13 ára gamal.

Heimbygdin Kunoy hevur altíð staðið hansara hjarta nær. Kemur tú á tal við hann og hann kemur í gongd at siga frá, kanst tú fáa nógvar stuttligar søgur úr heimbygdini.

Fyri Syderbø var tað ein stór hending at hann kundi ganga gjøgnum fjallið áðrenn Kunoyartunnilin alment varð skotin ígjøgnum. Sjálvur sigur hann, at hann var fyrsti kunoyingur gjøgnum tunnilin. Steffan Kunoy, bóndi í Útistovu, sum var elsti maður í bygdini, skjeyt síðsta skotið. Og út komin kunoyarmegin, handaði Syderbø Steffani eitt blómutyssi.

Í mong ár var Syderbø fjallmaður hjá Hans bónda. Tá hann ikki var heima, fór onkur av synunum fyri hann á fjall. Teir vistu akkurát hvar ódnin hjá pápanum var.

Og honum dámdi væl at hava heimaseyð. Øll familjan minnist serliga ta sera góðu skotsku ærina Stjørnuna, sum kom úr Suðuroy sum lamb. Fyrsta árið hon lembdi, vigaði lambið 66 pund og hetta var óhoyrt í Norðoyggjum. Øll hini árini hevði hon tvey góð lomb. Stjørnan bleiv 13 ára gomul.

Í 1945 giftist Johan við Elsebeth Malenu Poulsen, Lenu, heiman úr Húsi í Kunoy. Tey eiga níggju børn og eina rúgvu av abba og ommubørnum og nøkur langabbabørn eru nú eisini komin.

At Lena røkti heimið til fulnar gjørdi, at Johan kundi kasta seg fult og heilt yvir arbeiðið at skaffa teimum dagliga breyðið í munnin. Húsini eru ikki stór, men har hava mangan verið nógv fólk í húsi og altíð hevur verið pláss fyri fleiri. Orðatakið "Har hjartarúm er, er húsrúm" kann av sonnum brúkast um heimið hjá Lenu og Johan Syderbø.

Eins livandi og altíð fylgir Syderbø við tí, sum hendir í okkara samfelag. Hann lesir bløðini á tamb og lurtar eftir tíðindum í útvarpi og sjónvarpi. Han er altíð til reiðar at vera við í umrøðuni av politisku málunum, ið frammi eru.

Í dag fyllir hann 85. Og vit eru mong sum ynskja Syderbø hjartaliga tillukku við hesum stóra degi og vit ynskja tær nógv góð ár afturat.

**frændir**



Ummæli:



savnsmyndir

# Hann legði í munn mín ein nýggjan sang

*Victor Carlsen*
*ummælir*

Aftaná eitt ivaleyst strævið vikuskifti, framførdi okkara framúr góða gospelkór „United Voices“ tað tey høvdu lært á eini konsert í Fríðrikskirkjuni sunnukvøldið. Kórið hevði hetta vikuskiftið havt vitjan av navnframa normanninum Jens Christian Blom, sum hevði syrgt fyri, at kórið nú hevur 12 nýggjar sangir at syngja, og forkunnugt var at hoyra kórið og tónleikararnar framføra tilfarið rættuliga sannførandi.

Henda konsertin var samstundis triðja ferðin at kórið hevði eina sokallaða kirkjukonsert. Henda siðvenja kórsins byrjaði norðuri í Christianskirkjuni í Klaksvík, og helt síðani áfram í Vesturkirkjuni í Havn, og hesa ferð var so Fríðrikskirkjan vertur fyri konsertini. Einki er at ivast í at hetta er við at vera eitt afturvendandi tiltak hjá kórinum, soleiðis at vitja kirkjur okkara, og stuttligt er samstundis at síggja so stórar manfjøldir, ið trúliga vitja konsertirnar. Sunnukvøldið var einki undantak í so máta, tí neyðugt var at seta eyka stólar upp, so øll kundu koma inn, og kórið kundi rættuliga seta í gongd.

Nýggir sangir

Allarfyrst í konsertini fingu áhoyrarnir loyvi at syngja við vanliga væl kend kór, sum tey flestu nokk hava lært í sunnudagsskúlanum. Hesum parti skipaði Heine Lützen væl fyri, og sigast skal at væl varð sungið við. Eftir hetta byrjaði so kórið við tveimum av teirra „gomlu“ sangum undir leiðslu av teirra dagliga dirigenti Eirikki Skála og longu her var heitið fyri konsertini lýst, tí kvøldið alt var ein samlaður lovsongur til Gud, sum hevur gjørt alt so væl. Hann hevur nevnliga lagt ein nýggjan sang í munn okkara og hesin nýggi sangur er allur sum hann er ein lovsongur til Harran.

Gleðiligt var at hoyra kórið syngja eitt heilt nýtt úrval av sangum, sum kórleiðarin Blom hevði valt út. Jens Christian er jú ikki hvør sum helst. Hann er kendur frá tøttum samstarvi við nógv kend nøvn yviri í USA, eins og í Norðanlondum. Bæði sum kórleiðari, tónleikari og sangari hevur hann rættliga gjørt um seg. Sera heppi at kórið soleiðis fær so góða hjálp til at menna røddirnar og tónleikin má sigast vera sera gott.

Aðalroyndin

Alt vikuskiftið var nýtt til venjingar av hesum sangum, so tað var eitt heldur møtt kór, ið her fekk loyvi at vísa fram tað tey høvdu lært, og sigast má, at væl er kortini komið burturúr. Hóast mødd, so skiltist at tey øll royndu at gera teirra allar besta. Heilar 12 sangir sang kórið fyri okkum, bæði léttar og rytmiskar og eisini stillar og vakrar, enntá a capella - uttan tónleik. Og nú eg eri við tónleikin má eg siga, at her hava vit sjálvt „kremið“ innan føroyskan gospeltónleik. Gunnar Guttesen og hansara menn komu sera væl frá spælinum, dugdu væl at virða leiðbeiningina frá dirigentinum og spentu seg eisini út, tá tað rættuliga galt um. Legði til merkis meðan solonumrini vóru spæld, at Gunnar rættuliga fekk roynt seg við 32‘-indu pørtunum - ja, fingrarnir gingu nærum títtari enn trummustikkarar eftir tangunum, men framúr væl spælt. Hugnaliga Hammond-orglið gjørdi eisini undurverk, ja, tað hoyrir jú við. Guitari, bassur og trummur gjørdu eisini sítt til eina fráleika heild. Enntá saxofonin kom fram, tá Eirikkur spældi - frálíkt.

Vanligt er í skipanini hjá kórinum, at ymsir solosangarar koma fram at syngja, meðan kórið tekur sær av niðurløgunum. Hesir solosangarar komu allir sera væl frá teirra pørtum og tað hoyrist eisini at hesi gera nógv við at venja. Venjing ger sum kunnugt ein meistara, so tað er bara at dríva á við hesum, tí hví skulu vit ikki royna at gera okkara besta, enntá fyri Jesus, sum hevur gjørt so nógv fyri okkum.

Tað hoyrdist eisini at kórið sum heild hevur ment seg, serliga nú ein uttanlandsferð stendur fyri durunum, so eg haldi at kórið fer at umboða føroyskan gospeltónleik sera væl. Vitjað verður bæði í Íslandi og í Danmark, har sungið verður bæði innan- og uttandura. Ætlandi verður ferðin gjørd í juni/juli í ár, so her hava øll nakað at gleða seg til.

**Marathonsangur**

Fyri at savna inn pening til uttanlandaferðina, fer kórið í mai mánaða at royna ein sokallaðan marathonsang, har ætlandi kórsangur verður at hoyra í samfullar 24 samanhangandi tímar. Ja, spennandi verður at hoyra, hvussu hetta verður - og ikki minst at tiltakið verður væl stuðlað av trúgva lurtaraskaranum.

Samanumtikið kann sigast at konsertin var sera væl eydnað, og vita skulu tit, ið skipa fyri, at vit eru mong, ið fylgja tykkum á ferð tykkara. Væntandi fara tit sigursferð tykkara víðari um land okkara at vitja kirkjurnar, so enn fleiri fáa gleði av sangi og tónleiki tykkara. Kanska onkur onnur av fríkirkjunum fer at veita tykkum húsarúmd - hvør veit?

Eisini skulu góðynski fylgja tykkum, nú tit fyrireika uttanlandaferðina.



# Kyksilvur og PCB

*Hvaðan kemur tað, og hvussu er støðan á okkara leiðum?*

Fróðskaparsetur Føroya og Føroya Fróðskaparfelag skipa fyri almennum fyrilestri á Fiskirannsóknarstovuni mikukvøldið 15. mars 2000 kl. 20.00.

Maria Dam, dr.scient., heldur fyrilestur, ið hon kallar: Kyksilvur og PCB – Hvaðan kemur tað, og hvussu er støðan á okkara leiðum?

Maria Dam er norsk og búsitandi í Føroyum, fyrst frá 1977 til 1981 og kom aftur til Føroya í 1995. Hon hevur vart doktararitgerð í analytiskari evnafrøði við Universitetið í Trondheim, verið gestagranskari við Memorial University of New Foundland 1989-90 og við Aalborg Universitets Center 1990-95. Síðan 1995 hevur hon verið í starvi á Heilsufrøðiligu Starvsstovu. Hon kannar umhvørviseitur í tí føroyska umhvørvinum; nógv av hesum arbeiði er í samstarvi við onnur norðurlond ella størri altjóða bólkar. Arbeiðið fevnir um kortlegging serliga av dálkingini, ið kemur til okkara úr luftini, havinum og við tí, ið svimur og flýgur - serliga hesin seinasti bólkurin, grind og fuglur. Hesi seinastu árini eru umleið 500 grindahvalir kannaðir. Eisini hevur verið arbeitt við at fáa til vega álítandi kanningartøl um teista, æðu, havhest, skarv og lunda.

Fyrilesturin fer at viðgera umhvørviseitur, sum vit hoyra nógv um í sambandi við hval, serliga her á okkara leiðum. Hvaðan koma hesi evnini, hvat verða tey nýtt til, hvussu vandamikil eru tey, og hvussu síggjast tey aftur her hjá okkum? Í fyrilestrinum verður tó ikki bara viðgjørt umhvørviseitur í hvali, men eisini innihald og árin av hesum í øðrum føðsludýrum sum fiski og fugli, sum liva tætt at nútímans framleiðsluapparati.

# Nordatlantisk Korfestival

Aftur í ár verður skipað fyri kórstevnu undir heitinum “Nordatlantisk Korfestival”, har føroysk, íslendsk og grønlendsk kór í Danmark hittast til tveir dagar við sangi og hugna. Eisini eru einstaklingar við áhuga fyri sangi vælkomnir. Fýra slíkar stevnur hava verið áður — í ’97 í Århus, í ’98 í Odense og í 1999 í Keypmannahavn.

Stevnurnar higartil hava verið óføra góðar, og eini 150 eldhugaðir sangflytifuglar plaga at vera við til hetta tiltak. Hesuferð verður kórstevnan í Aalborg í døgunum 19. til 21. mei ið er um dýrabiðidagsvikuskifti. Tað er føroyska kórið í Aalborg, Álakórið, ið skipar fyri.

Luttakarar á kórstevnuni syngja saman í felagskóri, sum í ár er undir leiðslu av tveimum leiðarum. Annar er føroyingurin Heri Eysturlíð, sum er kendur í Føroyum, men nú er lagstur upp í Stokkhólmi, og hin er danin Erling Kulberg, lektari við Århus og Aalborg Universitet. Felagskórið fer at syngja bæði rútmiskt og klassiskt tilfar. Eisini verða føroyskir, íslendskir og grønlendskir sangir sungnir.

Á stevnuni verða tvær konsertir. Fyrra kvøldi syngja tey luttakandi kórini hvør sær, meðan felagskórið syngur seinna kvøldið. Framførðslurnar eru almennar.

Fyriskipararnir hava fingið fatur á sera væl egnaðum hølum, á Aalborg Specialpædagogiske Seminarium, Odinsgade 21 í Aalborg.

Luttakaragjaldið er 350 kr. Og skal rindast inn á konto í

BG-bankanum, reg. Nr. 1199, konto nr. 1-687-6542 *áðrenn 1. mei 2000*. Girokort verða *ikki* send út!

Ynskir onkur at vita meiri um stevnuna, er at venda sær til:

Óla Jákup Tvørfoss, tlf. 98311917 / 20159657 ella Ingu Samuelsen, tlf. 98149495

Eisini ber til at senda t-bræv til alakorid@hotmail.com